## Hondbóltskvinnurnar venja

Hvørki í Atlantic Airways- ella í Sunset-kappingini verða dystir spældir hetta vikuskiftið. Manslandsliðið er í løtuni í Luksemburg har kappast verður í Challenge Trophy kappingini, og kvinnulandsliðið er á venjingarlegu á Eiði. Hetta er liður í fyrireikingunum til landsdystirnar móti Íslandi, sum verða spældir seinast í november mánaði. Av tí sama eru allir dystir, sum skuldu verið spældir í Sunset-kappingini hetta vikuskiftið, fluttir.

## Kappingin fyrr liðug

Fótbóltssambandið hevur gjørt av, at fyrsta brikslið í øllum fimm Formula uppgerðunum, sum eru á skránni leygardagin í 27. og síðsta umfari, verður klokkan 14. Tað vil siga, at FSF hevur gjørt av at flyta dystirnar ein tíma fram. Harvið verður handan av FM steypi og heiðursmerkjum klokkan umleið trý korter til fýra og ikki trý korter til fimm. Hetta fer at bera við sær, at tað er minni vandi fyri, at fótbóltsspælið verður í myrkri, enn tað annars hevði havt verið, og tað ber eisini við sær, at myndatøkur eftir dystarlok ikki vera í so myrkum veðri, sum tær annars høvdu havt verið.

# Silvurið spøkir í Sundalagnum

**Bæði B71 og EB/ Streymur hava alla orsøk at spíla seg út, tá ið tey hittast í finalu heima á Sandi, hagar tað verður skipað fyri bussferð úr Sundalagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Bæði í B71 leguni og í EB/ Streyma leguni er hýrurin góður. Báðir partar eru samdir við seg sjálvar um, at talan hevur verið um fínt kappingarár. Hvussu væl tað fer at vignast á støðutalvuni eftir 27 umfør, verður ikki minst treytað av, hvussu tað fer at hilnast í morgin.

- Vit eru ovurfegnir um gull í steypakappingini, og at vit hava tryggjað okkum heiðursmerkir í landskappingini. Um tey skulu vera úr bronsu ella silvuri valdast eitt nú, hvussu tað fer at hilnast á Sandi. Tað hevði verið harmuligt, um úrslitið í Gundadali lagaði seg til okkara fyrimun, og vit ikki gjørdu okkara í síðsta umfarinum, verður staðfest í EB/Streymi.

Stuðlarnir ganga høgt upp í EB/Streym, og at tað framvegis verður hildið, at tað er nógv at spæla um, sæst aftur í, at tað verður skipað fyri bussferð av Eiði og suður um Skopunarfjørð í morgin.

Tað tykist greitt, at Símun Eliasen ikki verður í Sundalagnum næsta ár, og tað ljóðar, at Ronnie Samuelsen fer at gevast. Tískil kann tað vera, at teir báðir fara at siga farvæl í morgin.

Tað er greitt, at Piotr Krakowski, sum er væl kendur á Sandi, har hann eigur nógvar vinir, ikki verður venjari í EB/Streymi næsta ár. Eftir góð avrik hevði tað verið toppurin, um tað hevði eydnast honum og hjálparvenjaranum Sámal-Erik Hentze at runda av við silvurkrónunum í landskappingini.

Málið hjá sandoyingum var eftir uppflytingina í fjør at sleppa undan niðurflyting. Tað málið hevur B71 væl og virðiliga megnað. B71 er á 7. plássi, og um alt rekur við í morgin, so ber til at røkka 5. plássinum. Tað plássið hevur týdning á tann hátt, at tað ber ein eyka heimadyst við sær.

Eli Hentze, sum eisini næsta ár fer at stýra B71, fer í morgin at spæla fyri síðstu ferð á besta liðnum.

Fleiri av ungu B71 spælarunum hava í ár rættuliga bitið seg fastar á Formula liðnum, og tað hevur sæst aftur í landsliðsboðum. Allir hesir fara eisini at spæla við B71 í 2008, og tað fara útlendsku spælararnir við Clayton Soares á odda eisini at gera.

## NSÍ hátíðarheldur meistaraheitið

Í samband við at kappingin í Formuladeildini endar leygardagin, bjóðar NSÍ til veitslu klokkan 18 leygarkvøldið í ítróttarhøllini í Runavík. Har verður smyrjibreyð, kaffi, te og køkur at fáa. Á skránni verður felagssangur og annað undirhald. Av tí, at høllin skal nýtast til Faroe Expo dagin eftir, endar veitslan í høllini á midnátt,men heldur fram í Støkk-høllini, har góður dansur verður við Flower Power.

## AB takkar fyri seg

Tað vakti gleði á Argjum og øsing á Skála, tá AB vann síni fyrstu Formula-stig í útidystinum móti Skála fyrr í ár. Tað lyfti argjamenn nakað, samstundis sum Skála eftir fýra umførunum var púrasta avbyrgt í botninum. Yvir seinastu 23 umførini broyttist talvan tó nakað, og tá AB fer á vøllin leygardagin er tað við vissuni um, at hetta var seinasti Formula-dysturin á hesum sinni. Samstundis verður hetta seinasti dysturin hjá Sigfríði Clementsen sum AB-venjari. Hann verður komandi árið at síggja á beinkinum hjá EB/ Streymi, meðan Allan Mørkøre tekur við sum venjari hjá AB.

**-mørk**

# Vilja enda við manér

**Hóast spenningurin millum havnarfeløgini onkra tíð hevur verið størri, enn hann er tað leygardagin, so vilja fjeppararnir gera sítt til, at ræftur veitsludámur verður á degnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð síðani ár 2000 skal FM-steypið fyri føroyskan mansfótbólt flytast úr Havnini.

Tað ber so eisini við sær, at lagið í HB- og B36-legunum kundi verið betri, nú feløgini mest sum hava vant seg við, at FM-spurningurin er nakað, ið tey avgreiða sína millum. Og ikki minst hevur spenningurin verið øgiligur, tá liðini fleiri ferðir hava spælt avgerandi grannauppgerðir í seinasta ella næstseinasta umfarinum.

Soleiðis er tó ikki hesaferð. B36 hevur síni silvurmerki at spæla fyri, men UEFA-cup luttøkan er vís, og eftir tvey tap á rað er lagið neyvan heilt í toppi. Og hjá HB verður talan fyri fyrstu ferð síðani 1999 um eitt ár uttan heiðursmerki í landskappingini.

### Fjepparar spenna seg

Men tað merkir altso ikki, at fjepparnir hjá feløgunum báðum ikki fara at spenna seg út. Bæði feløgini hava í ár fingið nýggj viðhaldsfeløg. B36 hevur í ár fingið dyggan stuðul frá sínum White Tigers, og hjá HB vórðu Red Lions stovnaðir undan steypafinaluni móti EB/Streymi.

Og bæði leyvurnar og tikararnir vilja markera, at hóast tokið er koyrt í landskappingini, so ræður framvegis um at vinna sær ræftin at arga komandi hálva árið, samstundis sum punktum skal setast fyri fótbóltsárinum.

HB-stuðlar og Red Lions skipa fyri dystinum fyri upphiting í HB-húsinum, og byrjar hendan klokkan 13.

Hvítu tikararnir hava gjøgnum árið havt sítt fasat upphitingarstað undan heimadystunum hjá B36, og ivaleyst verður tað eisini hetta, sum verður nýtt leygardagin.

## Málveitsla í væntu

| | 07 | '06 | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-HB | 1-1 | 6-0 | - | 2-1 | 0-0 | 2-5 | 0-2 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 0-2 | 0-1 | 2-3 | 3-2-7 | 16-19 |
| KÍ-NSÍ | 2-0 | 2-1 | - | 5-6 | 2-3 | 1-0 | 2-2 | 2-3 | 2-1 | 0-1 | 3-0 | 4-1 | 4-0 | 7-1-4 | 29-18 |
| Skála-AB | 0-2 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-1 | 0-2 |
| B71-EB/S | 2-3 | - | - | - | - | - | - | - | 1-0 | - | - | - | - | 1-0-1 | 3-3 |
| VB/S-GÍ | 0-1 | 0-0 | - | 0-3 | 0-1 | 2-4 | 0-3 | 1-2 | 1-2 | 5-3 | 1-3 | 3-1 | 0-0 | 2-2-8 | 13-23 |

*Skal metast eftir hagtølunum, so verður tað undirhald við lít, tá NSÍ fer til Klaksvíkar eftir gullinum. Hagtølini staðfesta í øllum førum, at tað plagar at vera málríkt, tá vespurnar vitja við Djúpumýru, har KÍ og NSÍ hava spílað meskarnar ikki færri enn 47 ferðir seinastu 10 árini. Aðra staðni sæst á hagtølunum, at HB væl kann geva B36 eina hjálpandi hond, meðan Petur Mohr helst kann siga farvæl til GÍ við einum sigri, tá teir vitja í Vági. Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini leygardagin hava dystast í tilsvarandi uppgerðunum í bestu deildini seinastu 10 árini.*

## Við – ikki við

**Skaddur: Jákup á Borg (lærkrikin)**
**Ivasamur: Tróndur Vatnhamar**

**Ivasamur: Nenad Stankovic**

**Skaddir: Arnold Berg (miniskskaði) og Aleksandur Johansen (fótskaði)**
**Við aftur: Pauli G. Hansen**
**Leikbann: Teitur R. Joensen**

**Leikbann: Paul Clapson og Høgni Madsen**
**Við aftur: John Hammer og Ove Nysted**

**Skaddur: Henning Joensen (knæskaði)**
**Leikbann: Martin Tausen og Aco Pandurovic**